UTTAN ÚR HEIMI

## Greenpeace eftir kjarnorkuskipum

Umleið tjúgu skip hjá umhvørvisverndarfelagsskapinum Greenpeace hava seinastu dagarnar ligið í Írska Havinum, har tey ætla at mótmæla tveimum skipum, sum eru á veg til Bretlands við kjarnorkuburturkasti.

Kjarnorkuverkið í Sellafield sendi burturkastið til Japan í 1999, har tað skuldi endurvinnast, men tá tað kom fram, at bretar høvdu givið japanum skeivar upplýsingar um farmin, vildu japansku verkini ikki hava burturkastið. Tí eru bretar noyddir at taka tað aftur, og nú eru tvey farmaskip á veg til Sellafield við teirri vandamiklu lastini.

Greenpeace sigur, at felagsskapurin fer ikki at gera seg inn á tey bæði farmaskipini, men bert at mótmæla flutninginum. Tey bæði farmaskipini hava kanónir at verja seg við, og bretskir kavbátar eru í fylgi við teimum.

## Misnøgdir pedagokar

Pedagokarnir í nógvum donskum kommunum eru í øðini inn á teir kommunalu myndugleikarnar, sum ætla at spara á ansingarøkinum.

Misnøgdin við tær politisku ætlaninar er so stór, og í fleiri av teimum stóru býunum hava pedagokarnir verið í verkfalli. Í býum sum Århus, Odense, Esbjerg og Randers hava pedagokarnir sitið við hús, og tað hevur sum vera man havt við sær, at foreldrini hava verið noydd at vera heima ella at taka børnini við sær til arbeiðis.

Pedagokarnir siga, at tær ætlaðu sparingarnar hjá kommununum fara at kosta fleiri hundrað arbeiðspláss, samstundis sum umstøðurnar hjá børnunum verða mundandi verri. Kommunurnar siga, at tær eru noyddar at spara, tí pengingurin røkkur ikki til.

## Seldi irakum uran

Eitt blað í Brasil vil vera við, at irakar keyptu uran frá brasilska hernaðarstýrinum í árunum frá 1979 til 1990. Sambært blaðnum var talan um fleiri tons, sum vórðu flutt við skipi til Irak.

Upplýsingarnar í brasilska blaðnum koma bert fáar dagar eftir, at ein útlagin irakskur kjarnorkuserfrøðingur hevur sagt, at Irak er ført fyri at gera kjarnorkuvápn um stutta tíð.

Khadir Hamza vil vera við, at Irak hevur arbeitt við einari kjarnorkuvápnaætlan í fleiri ár, og at landið skjótt fer at hava fleiri kjarnorkubumbur. Khalid Hamza var við til at seta iraksku kjarnorkuvápnaætlanina í verk, men flýddi av landinum í 1994.

## Støðast ikki á bygd

Ein kanning í Noregi vísir, at fólk, sum á ungum árum flyta úr teimum stóru býunum at búseta seg, velja rættiliga skjótt at flyta aftur til býirnar at búgva.

Tað er størri stuðul til skúlanæmingar, ókeypis grundstykki og trygg arbeiðspláss, sum fáa nógvar ungar norðmenn at flyta út á bygd at búseta seg, men kanningin vísir, at tey støðast kortini ikki. Sambært kanningini flyta 70 prosent av fólkinum innaftur í býirnar, áðrenn tey hava fylt 35 ár.

Ein samfelagsfrøðingur, sum hevur kannað viðurskiftini, heldur, at tey góðu og dragandi tilboðini hjá teimum smáu kommununum galda ov stutta tíð, og at fólk tí rýma haðani, tá umstøðurnar broytast.

# So slakaði Irak

**Irak hevur nú játtað at lata vápnaeftirlitsmenninar hjá ST koma aftur til landið, men sjálvir vænta irakar ikki, at hetta fer at sissa amerikanararnar.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*



*Tað var irakski uttanríkisráðharrin, Naji Sabri, sum handaði ST-aðalskrivaranum tilsøgnina frá stjórnini í Bagdad, sum treytaleyst loyvir ST-vápnaeftirlitsmonnunum at taka arbeiðið uppaftur.*

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, boðaði gjáranáttina frá, at hann hevði fingið tilsøgn um, at Irak er sinnað at lata vápnaeftirlitsmenninar hjá ST koma aftur til landið.

Stutt undan kunngerðini hevði irakski uttanríkisráðharrin, Naji Sabri, handað Kofi Annan eitt bræv frá iraksku stjórnini, har stjórnin boðaði frá, at hon er sinnað at lata eftirlitsmenninar hjá St koma aftur.

– Eg kann vátta, at so er, og at irakska avgerðin er treytaleys, segði Kofi Annan. Aðalskrivarin legði afturat, at tann hvassorðaða røðan hjá George W. Bush, forseta á aðalfundinum hevði havt sína ávirkan, og at seinastu dagarnar hevur allur heimurin lagt trýst á Irak fyri at fáa landið at slaka.

– Næstan hvør einasti røðari á aðalfundinum hevur biðið Irak lata vápnaeftirlitsmenninar sleppa aftur til arbeiðis, segði Kofi Annan.

### Neyvan nóg mikið

Irakska stjórnin heldur eftir øllum at døma ikki, at avgerðin at lata vápnaeftirlitsmenninar koma aftur er nóg mikið til at sissa amerikansku stjórnina. Tað kom fram í Bagdad í gjár.

– Hetta málið endar ikki her, sjálvt um vit hava loyvt vápnaeftirlitsmonnunum at koma aftur. Amerikanski politikkurin hevur til endamáls at fáa fatur á oljuni við Persaflógvan, eisini iraksku oljuni, segði irakski varaforsætisráðharrin, Tariq Aziz.

Aziz legði afturat, at nú vápnaeftirlitsmenninir sleppa aftur til arbeiðis, hevur amerikanska stjórnin onga umbering fyri at leypa á Irak longur.

George W. Bush, forseti hevur fyrr sagt, at USA fer ikki at helma í, fyrr enn irakski forsetin, Saddam Hussein, er koyrdur frá, tí hann er ein hóttan fyri heimsfriðin.

# Innflytararnir drignir upp í týska valstríðið

Í einari seinastu roynd at venda gongdini upp undir valið til týska samveldistingið hava teir konservativu nú drigið innflytaraspurningar upp í valstríðið. Hesir spurningar hava annars ikki verið umrøddir.

Konservativa kanslaravalevnið Edmund Stoiber sigur, at tað er neyðugt at seta mark fyri, hvussu nógvir útlendingar kunnu sleppa til Týsklands. Hann heldur, at týsku myndugleikarnir eiga heldur at virka fyri, at teir útlendingarnir, sum eru komnir, fáa betri umstøður, enn teir hava.

Eygleiðarar í Berlin siga, at tann nýggi tátturin í valstríðnum kann geva teimum konservativu nakrar atkvøður afturat, men teir ávara samstundis um, at hetta er eitt sera viðkvæmt evni at taka upp, og at tað lættliga kann vísa seg at vera eitt mistak.

Joschka Fischer, uttanríkisráðharri segði í gjár, at teir konservativu eiga at ansa eftir, at teir ikki birta upp undir fremmandahatur í týska samfelagnum.

# Al Gore vil hava umdyst við Bush

**Demokratiska forsetavalevnið fyri tveimum árum síðani, Al Gore, hevur gjørt av at bjóða George W. Bush av til umdyst um tvey ár.**

USA
*Árni Joensen:*

Alment hevur Al Gore sýtt fyri at svara, tá hann hevur verið spurdur, um hann ætlar sær at royna eina ferð afturat at gerast amerikanskur forseti.

Men nú skrivar Drudge Report, at Gore fer at royna at gerast valevni hjá demokratunum, tá forsetaval verður aftur um tvey ár. Tíðindastovan sigur seg hava tíðindini frá vælvitandi keldum í Washington.

– Tað verður umdystur í 2004. Flokkurin hevur givið tilsøgn um at stuðla Al Gore til næsta forsetaval, og hansara næstu hava eisini mælt honum til at royna eina ferð afturat, skrivar Drudge Report.

Slagorðið upp undir valið ber sambært tíðindastovuni upp á rím. Tað verður "Gore in 04".

Eygleiðarar í Washington halda, at Al Gore fer ikki at kunngera avgerð sína fyrr enn umnakrar mánaðir. Men eygleiðararnir hava lagt til merkis, at Gore hevur verið sera atfinningarsamur ímóti stjórnini hjá Bush í seinastuni. M. a. hevur hann funnist hvassliga at búskapar- og umhvørvispolitikkinum.

Norðurlendsk brúkaraumboð:

# Støðan er sum í Eysturevropa

**– Faktistk er støðan verri her enn í Eysturevropa á brúkaraøkinum, og tit eru langt aftanfyri hini norðurlondini, sigur formaðurin fyri NKU, ið er norðurlendski samstarvsfelagsskapurin fyri brúkarafeløg**

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*



*Mynd: F.v. Finn T. Aas, formaður fyri NKU og úr Norra, Johannes Gunnarsson, formaður fyri íslendska forbrúkarafelagið, og Eeva-Liisa Koltta-Sarkanen, "øverinspektør" úr Finnlandi.*

Í farnu viku hevði NKU(Nordisk Konsumentudvalg) ráðstevnu í Føroyum. NKU er norðurlendskur samstarvsfelagsskapur, ið er settur saman av teimum ymsu brúkarafeløgunum í Norðurlondum og ymiskum øðrum, sum fáast við brúkaraviðurskifti í Norðurlondum, t.e. granskarar og onnur. Felagsskapurin skal virka ráðgevandi fyri serliga Nordisk Ministerråd, ið eisini fíggjar virksemið hjá felagsskapinum.

Øll Norðurlond eru umboðaði í NKU. Grønland kom fyri fyrstu ferð við fyri trimum árum síðani. Í sambandi við ráðstevnuna í Føroyum vóru ymsir føroyingar við sum gestir.

– Vit sakna føroyingar í hesum samstarvinum. Okkara fatan er, at øll lond eiga at verða umboðaði, ið kunnu roknast sum norðurlond, sigur Johannes Gunnarsson, formaður fyri íslendska forbrúkarafelagið og limur í NKU.

Norðurlendskt brúkaravernd og brúkarapolitikkur hevur verið at rokna sum tann besti í heiminum, men nú hevur ES gjørt meira við økið, og tyngdarpunktið liggur nú heldur í Brússel.

Í Norra er forbrúkararáðið har tann mest virdi stovnurin í landinum, og aðrastaðni eru stovnarnir rættiliga væl umtóktir. So nógv, at arbeiðsbyrðan er rættiliga stór.

Formaðurin í NKU undrast stórliga á støðuna í Føroyum.

– Eg gjørdist bilsin, tá eg frætti um, at tað í Føroyum einki felag var, og lítil og eingin vitan var um, hvat fólk kundu klaga um, og hvørji brúkararættindi vóru. Eg havi ta kensluna av, at brúkarapolitikkur ikki er til í Føroyum, og hetta gjørdi meg ógvuliga bilsnan, tí eg helt, at Norðurlond vóru ógvuliga frammaliga á hesum økinum. Faktiskt er støðan í Føroyum verri enn í fleiri Eysturevropeiskum londum, sigur Finn T. Aas formaður fyri NKU.

Hann leggur afturat, at føroyingar burdu havt líka stóran rætt til brúkaravernd sum aðrir norðurlendskir borgarar.

### Felags lógarverk

Ein stórur partur av arbeiðinum hjá NKU er at fáa felagslógarverk í øllum Norðurlondum á brúkaraøkinum.

– Vit hava roynt øll tey árini, ið norðurlendska samstarvið hevur verið til, at fingið eitt felagslógargrundarlag í øllum londunum, sigur Finn T. Aas.

Hesi seinnu árini hevur nógv virksemi snúð seg um ES, og tey viðurskifti, ið gera seg galdandi í ES og samstarvi við ES. Reglar, ið ES kemur við, verða Norðurlond eisini noydd at fylgja.

Reint praktiskt heldur NKU tvær ráðstevnur um árið. Tann eina av ráðstevnunum í ár varð hildin í Føroyum og snúði seg um digitalisering (talgildan) á brúkaraøkinum. Aftur her verður ES og tess reglar knýtt uppí. Í sambandi við ráðstevnurnar eru vanliga fleiri víðagitnir granskarar úr norðurlondum ella aðrastaðni frá.

– Roynt verður at varpa ljós á fleiri sentralar spurningar í brúkarahøpi, og vit royna at ávirka myndugleikarnar og kunna teir um støður og ætlanir, sigur Finn T. Aas, formaður fyri NKU.

– Tað er vorðið meira og meira týdningarmikið, at vit í felag royna at nýta hesar fundirnar til at ávirka avgerðir hjá ES, sigur Finn T. Aas.

Ísland og Norra eru ikki limir í ES, men við limaskapinum í European Economic Area (EEA), og hetta ger, at Norra og Ísland noyðast at seta í verk tað lógarverk, ið verður sett í verk í Brússel.

# Føroyskt brúkarafelag á veg

**Eftir ráðstevnuna í Føroyum eru fólk farin undir at seta á stovn brúkarafelag**

BRÚKARAFELAG
*Heri á Rógvi*

Tað er nú nógv, ið røkist fyri, at eitt brúkarafelag aftur verður sett á stovn í Føroyum.

Áður hevur verið brúkarafelag í Føroyum, men hetta datt niðurfyri, ikki minst tí, at arbeiðið var at kalla alt sjálvboðið.

Á ráðstevnuni hjá NKU, ið varð hildin í síðstu viku, vóru fleiri føroysk umboð við, og tey gjørdu vart við støðuna í Føroyum.

Hans Pauli Strøm, fyrrverandi løgtingsmaður og føroysku kontaktpersónur á ráðstevnuni, sigur, at útlendsku luttakararnir vóru stórliga bilsnir yvir, at brúkaraøkið í Føroyum var so illa fyri.

– Rættiliga nógv tíð varð nýtt til at tosa um tey føroysku viðurskiftini, og fleiri gjørdist heilt skelkaða av at hoyra, hvussu illa stóð til, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann leggur afturat, at økið er ógvuliga nógv forsømt í Føroyum, og politiski myndugleikin eigur at taka stig til at fáa gjørt nakað við hetta.

Nýggja føroyska felagið fer at hava fund seinni í hesu vikuni.

Hans Pauli letur sum heild væl at ráðstevnuni.

*Hans Pauli Strøm, sum er ein av teimum í nýggja føroyska brúkarafelagnum.*




GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra**
reyður, 5 hurðar,
15.000

**Nissan Terrano II 2,7DT Van**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1996.

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
105.000

**Peugeot 306 DT 1,9**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
90.000

**Peugeot 406 ST 2,1 DT**
beige, 4 hurðar,
árg. 1997, 136.000 km.
143.000

**Opel Astra 1,6**
5 hurðar,
árg. 1998.
92.000

**Opel Astra 1,6 St. Car**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1993, 116.000 km.
55.000

**Opel Astra 1,7 DT**
brúnur, 4 hurðar,
árg. 1996.
78.000

**Opel Astra 1,6**
beige, 4 hurðar,
árg. 1997.
78.000

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 60.000 km.
67.000

**Opel Astra 1,6 16V**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1999, 30.000 km.
125.000

**Opel Astra 1,7 DT**
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1997, 101.000 km.
89.000

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
67.000

**Opel Astra 1,7 DT**
beige, 5 hurðar,
árg. 1996, 95.000 km.
85.000

**Opel Vectra 1,8**
svartur, 4 hurðar,
árg. 2000, 22.000 km.
174.000

**Opel Vectra 2,0 Di**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1998, 96.000 km.
130.000

**Audi 100**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1987, 290.000 km.
25.000

**Fiat Marea 1,6**
svartur, 4 hurðar,
árg. 1996, 70.000 km.
85.000

**Ford Courier 1,8d Diesel Van**
reyður, 3 hurðar,
árg. 1995.
28.000

**Ford Escort 1,6 Van**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1996.
65.000

**Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin